Sosialurin

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R  2 2 .  s e p t e m b e r  2 0 0 6



**Maðurin uttan fortíð**

Finski leikstjórin Aki Kaurismaki fekk Grand Prix-heiðurslønina frá dómsnevndini í Cannes-festivalinum fyri hetta meistaraverkið, sum er eitt komediu-drama. Navnleysi høvuðspersónurin tekur tokið til Helsinki, men hann verður harðliga álopin av einum harkaliði, sum stjelur alt frá honum. Tá ið hann vaknar á sjúkrahúsinum minnist hann einki. Men hann fær samband við Irmu, sum arbeiðir í køkinum hjá Freslunarherinum.

**Mikudag 27. kl. 21.00**



**Ramadan-kalendarin**

Í Danmark hevur mann havt eina langa siðvenju við sjónvarpskalendara í samband við kristnu hátíðina, men tann mest týðandi hátíðin hjá muslimum, Ramadan, hevur hyggjarin ikki sæð so nógv til. Nú fer DR2 undir at senda Ramadan-kalendaran, har fylgt verður við nøkrum donskum muslimum gjøgnum Ramadan, tann islamski heilagi føstumánaðin.

**Sunnudag 24. kl. 18.55**

**G! Festivalur 2006**

Vit eru á G og uppliva festivallívið. Tríggir spennandi dagar fyltir við spennandi fólki, góðum vibratiónum og ikki minst tónleiki, tónleiki og uppaftur meira tónleiki...
Lagt til rættis: Eir í Ólavsstovu.

**Fríggjadag 22. kl. 19.25**

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**